


**Nr. 8** **14. apríl 2013** **73. árg.**

# Freisting

*Av tí at hann sjálvur varð freistaður, kann hann koma teimum til hjálpar, sum verða freistað.*

*Hebr. 2,18.*

Í eini kirkju í Onglandi varð ein dýrabarur rútur brotin. Hetta var meðan Cromwell ráddi. Orsøkin var, at ongi bíløt skuldu vera í kirkjunum. Seinni vórðu øll brotini savnað og sett saman aftur, og soleiðis er rúturin varðveittur. Men har er ongin mynd. Einastaðni sæst eitt oyra, partur av einum hjálmi, men har er ongin samanhangur. Soleiðis er okkara søga. Hon er farin í sor. Um vit seta hana saman, verður hon bert brot, sum vit ofta síggja í modernaðari list. Men mitt í brotunum er eitt andlit. Her er tann gloymda ætlanin. Guds andlit. Hetta andlitið kemur til okkara, tá ið ongin annar er hjá okkum longur.

Hann varð freistaður og hevur liðið. Ein setningur, sum inniheldur bæði pínu og stríð. Men tað er hent. Okkara vegna hendi tað. Har hómast eitt andlit. Eitt ljós verður tendrað í myrkrinum, og vit eru ikki einsamøll.

Sum tann, ið sjálvur er freistaður og hevur liðið, kann hann koma teimum til hjálpar, sum verða freistað. Og hann **vil**. Hann er okkum nær, annaðhvørt vit skilja tað ella ikki. Jesus er vorðin freistaður á allan hátt eins og vit, men tann Óndi vann aldri á honum. Í tí løtu, at vit varnast sniðálopini frá tí ónda, og óttin herjar á okkum, kann Jesus koma okkum til hjálpar. Tí er meining í orðunum í danska sálminum: ”Stå os bi, når fjenden frister!” Jesus er sigursharrin.

Við Jesusi hava vit friðin. Við honum skulu vit sigra. Bara við honum.

# Vit sóu dýrd hansara

Soleiðis ljóðaði vitnisburður Jóhannesar um sín elskaða Harra og Meistara, og høvdu vit eisini kunnað sagt hesi orðini! Tað er umráðandi fyri lív okkara, at vit eisini síggja dýrd Jesusbarnsins. So vit fella á knæ og tilbiðja elskuliga son Guðs, sum í miklum ríkidømi gjørdist fátækur, fyri at vit skulu gerast rík í Guði, rík um allar ævir.

Dýrd Meistarans! So vit í øllum førum eru orðum hansara lýðin og tæna honum, lata sannleikaorð hansara fáa vald á lívi okkara og ongantíð ivast um evni hansara at hjálpa okkum í hvørjari neyð.

Dýrd Frelsarans! So vit tilbiðjandi taka kross hansara í føvningin og glað takka honum, tí hann vil vera kongur og frelsari syndarans.

Vit sóu dýrd hansara!

Ein húsmóðir doyði. Skilnaðarstundin var blíð og góð. Glað og reyst segði hon sínum kæru farvæl. Hon visti, hvat gott og vælsignað bíðaði henni. ”Hevði eg mál,” segði hon, ”skuldi eg sungið ein lovsong. Nú mugu tit halda á, og so skal eg standa á hini himmalsku strondini og bíða eftir tykkum.”

Á einum kransi við kistuna stóðu hesi orðini:
”Vit sóu dýrd hansara!”

Soleiðis kann kærleiki Frelsarans berast aftur úr einum mannalívi. ”Tað, sum ræður um,” sigur Selma Lagerløf í einum vakrari jólahalgisøgu, „er, at vit hava eygu, sum síggja Guðs dýrd.”

Latið okkum biðja Guð um hetta!

Harri, lat upp eygu míni, so eg síggi dýrd tína!

*t.* týddi.

---

Ein kona, sum vitnaði, las hetta bíbliuorðið upp: “Tjóvurin kemur ikki til annað enn at stjala og drepa og oyða; eg eri komin til tess, at teir skulu hava lív og hava yvirflóð.” Jóh. 10,10.

“Soleiðis var tað í okkara lívi. Vit lurtaðu eftir tjóvinum - sum er djevulin - vit stuttleikaðu okkum og fyltu okkum við rúsdrekka og rúsevnum,” vitnaði konan. “At enda máttu vit sanna, at tjóvurin hevði stolið alt frá okkum og oyðilagt lív okkara.

Tá vendu vit okkum til Jesusar og fingu eitt spildurnýtt lív, ja, lív í yvirflóð frá honum. Hann er hin einasti, sum kann gera sálina nøgda. Eydnan liggur ikki í tí, tú eigur, men í hvørjum tú trýrt á. Eg skilji ikki, hví ikki allur heimurin er frelstur. Bíblian sigur: “Tann,

sum hevur sonin, hevur LÍVIÐ.” Tað merkti eg sanniliga, tá ið eg sjálv bleiv frelst. Fyrr var eg bara til, nú LIVI eg av sonnum.

*Effie Campbell* umsetti.

# Guds trúfesti

Gud er trúfastur, ja, hann er trúfastur heilt til endan. Í Jesaja 46,4 stendur: ”Alt at ellisárum eri eg hin sami; eg beri tykkum, til hárini á tykkum grána; eg lyfti og fari undir tykkum, eg beri og bjargi tykkum.” Tá ið vit gerast gomul, veik og skroypilig, tá fer Gud ikki frá okkum. Nei, hann ber, lyftir og bjargar okkum. Vit kunnu leggja okkum afturá og hvíla okkum uppat hansara brósti.

Hetta fingu vit at sanna nú eitt kvøldið, tá ið vit vóru farin niðan á Lágargarð at halda andakt í samband við missiónsvikuna í Havn. Vit saknaðu eina konu, sum hevði verið so trúføst at gingið á møti í Meinigheitshúsinum, líka til hon ikki var ment longur. Hon fer at fylla 99 ár nú í summar.

Vit vóru tvær, sum fóru inn á kamarið hjá henni. Tá liggur hon í songini og syngur undurfulla sálmin hjá Brorson. Hon sá ikki okkum, tí hon lá í hálvmyrkri, og vit stóðu úti við dyrnar. Vit stóðu kvirrar, meðan hon sang. Tað var ein hugtakandi løta, og vit blivu so signaðar av hesum góðu orðunum. Tað er alt evangeliið, sum er savnað saman í hesum báðum versunum. Um evnini ganga fyri, og tú gloymir alt, so gloymir tú aldri Jesus, og hann heldur fast til endan. Les sangin tvær ferðir ígjøgnum, so tú rættiliga fært fatur á evangeliinum og sært, hvat ið Jesus hevur gjørt fyri teg.

*Hvo vil mig anklage,*
*og for dommen drage*
*hen på Sinai?*
*Synden jeg bekender,*
*mig til Jesus vender,*
*så gør han mig fri.*
*Mød mig da*
*på Golgata!*
*Jesus skal min sag antage,*
*hvo vil mig anklage?*

*Hvo vil mig fordømme?*
*Jesu blodestrømme*
*sænker jeg mig i;*
*Gud i himmerige*
*dømme vil og sige:*
*Denne han er fri;*
*han er to’ t*
*i Jesu blod!*
*Satan, synd og død må rømme,*
*hvo vil mig fordømme.*

*Effie Campbell* umsetti.

# Mín lukka

Eg havi ofta eitt ávíst skriftstað á munni, tí mær dámar tað so ómetaliga væl. Tað stendur í Sálmi 73,28: **“At leve Gud nær er min lykke.”** Á føroyskum ljóðar tað: “Mítt góða er at vera Gudi nær.”

Um tú spyrt fólk á gøtuni, hvat ið lukkan er, fert tú at fáa eina rúgvu av ymiskum svørum. Tað kann vera alt frá at vera millióningur til at vera forelskaður. Frá eini ferð upp á mánan til at hava góða heilsu. Frá at eiga ein Porche til at njóta ta setandi sólina. Frá at eiga hús á Hawaii til at hava ein kolonihava, o.s.fr. Eg eri púra sannførdur um, at tú skalt leita leingi eftir einum dana, ella fyri alt tað eftir einum menniskja, sum vil svara tær: **“At liva Gudi nær er mín lukka!”** Ella eitt svar, sum peikar tann vegin.

Men um hetta er tín lýsing av orðinum lukka, ert tú veruliga eitt eydnusamt menniskja. Tá hevur tú funnið lívsins loyndarmál. Tá er Himmalin opin fyri tær. Tá kanst tú siga við sálmaskaldinum í Sálmi 73, at “bert eg eri hjá tær, leggi eg einki í heimin, ... tí Gud er mín klettur.”

Um tað er hin stóra rúmdin ella tær smáu blómurnar, so er alt vakurt og yndisligt skapt av Gudi. Og hugsa tær: Hann er Pápi mín! At liva honum nær er mín stóra lukka!

Himmalski Faðir, takk, at tað er vorðið mín lukka at liva tær nær. Takk, at tú ert mín hjartans Klettur. Vit biðja teg, at tú vilt hella tín Anda út yvir land okkara, yvir Norðurlond, yvir Evropa, so at menniskju steðga á í síni jagan eftir einari stuttari og fyribils lukku, og staðin fyri uppliva umvending frá vantrúgv til livandi trúgv á Jesus Kristus og ta sonnu, varandi og ævigu lukku, sum tað er at kenna teg. Í Jesu navni biðja og takka vit. Amen!

*Effie Campbell* umsetti.

---

Vit eru stødd á einum vígvølli og ikki á einum hvíldarheimi.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 14. apríl. | Tekstur: | Luk.10,38-42; | bíbliuorð: | Matt. 6,33 |
| 21. apríl. | Tekstur: | Matt. 26,69-75; Jóh. 21,15-19; | bíbliuorð: | Sálm. 103,12 |
| 28. apríl. | Tekstur: | Luk. 18, 9-14; | bíbliuorð: | Matt. 7,7 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta,  35 77 74